# Opel Vectra - størri og fínari bilur enn forgangarin




*Nýggi Opel Vectra, ið er størri enn forgangarin, kemur í harða kapping í miðalklassanum. Bilurin sær gott út og hevur allar fyritreytir fyri at klára kapingina*

**Nýggjur Opel Vectra er á veg. Bilurin, ið verður størri enn forgangarin, kemur á marknaðin tíðliga í summar. Talan er um ein væl útgjørdan bil, sum kemur í harða kapping í miðalklassanum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Vectra verður ein størri bilur enn forgangarin, 10 cm longri, 9 cm breiðari og 3,5 cm hægri. Opel hava gjørt ein íløgu uppá 5.9 milliardir krónur í verksmiðjuna í Rüsselheim í Týsklandi, har Vectra í sedan útgávuni verður gjørdur, og 2,4 milliardir krónur í Ellesmere verksmiðjuna í Onglandi, har hatchback útgávan av Vectra verða framleiddir. Teir vænta sær nógv av nýggja Vectra.

### Góður kvalitetur

Vectra skal kappast við bilar sum Ford Mondeo, Citroën C5 og Nissan Primera. Nógv er gjørt burturúr kvalitetinum og koyrieginleikunum. Bilurin hevur ein heilt nýggjan "multilink" bakaksil og elektroniskt stýrda elektrohydrauliska servostýring. Umframt nógva aðra útgerð sum betra um koyrieginleikarnar.

### Trygdarútgerðin

Trygdarútgerðin umfatar til dømis airbag framman, í síðunum og gardinairbag, og elektroniskt stabilisering program (EPS).

Opel hava eisini patent uppá teirra pedalskipan, sum verjir bilføraran ímóti skaða í beinini við ein samanstoyt, eins og aktivar "anti-whiplash" nakkapútur. Annars fæst Vectra við hópin av eykaútgerð sum er við at økja um trygdina komfortin hjá bilførarnum og teimum ferðandi.

### Stationvognur seinni

Teir fyrstu bilarnir sum koma á marknaðin, koma við 4 syl. ECOTEC bensinmotorum við 122 og 147 hk og dieselmotorar við 100 og 125 hk.

Seinni koma aðrir motorar, sum t.d. ein 3,2 litur V6 við 211 hk. Í fyrstu atløgu kemur Vectra bert sum sedan og hatchback. Næsta ár kemur ein stationvognur saman við eini MPV útgávu.



*Vectra í hatchback útgávuni verða gjørdir í Onglandi. Bilurin hevur smart design*




*Opel Vectra sedan aftan – minnir ikki sørt um Opel Astra…*






*Nissan Primera, smart design, sportligar og komfortablar koyrieginleikar. Páll Danielsen, sølumaður hjá P/F Meinhardt Arge við ábyrgd av Nissan bilunum, er her við nýggjasta Primera stationcar. Høgrumegin síggja vit Nissan Primera sedan. Samstarvið við Renault sæst týðuliga aftur í designinum á bilinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Nissan Primera - sameinir sportligar og komfortablar koyrieginleikar

**Nýggi Nissan Primera er ein kolvelting, um vit sammeta við forgangaran. Samstarvið við Renault sæst týðuliga aftur í designinum á bilinum, ið bleiv kosin ársins bilur av TopGear í Onglandi. Bilurin verður gjørdur sum sedan, hatchback og stationcar**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Nýggi Nissan Primera er ein smartur bilur, sum kemur at gera um seg millum kappingarneytarnar. Bilurin er bygdur yvir ein heilt nýggjan plattform og er nakað størri enn forgangarin. Sum nakað heilt nýtt eru instrumentini í miðjuni á instrumentborðinum, og allar funktiónirnar eru í eini konsoll í miðjuni. Hann hevur t.d. kamera á instrumentborðinum at bakka við, eins og vit kenna tað frá lastbilum og bussum.

### Eisini sum diesel

Primera fæst í útgávunum: Visio, Acenta og Tekna. Tríggir bensinmotorar eru at velja ímillum: 1.6 litur 16V/109 hk, 1.8 litur 16V / 116 hk og 2.0 litur 16V / 140 hk og ein 2.2 litur CDi commonrail dieselmotorur við 126 hk. Sum tann einasti í sínum klassa kann Primera leverast við fartpiloti, sum altíð heldur røttu frástøðuna til bilin sum koyrir frammanfyri.

### Útgerð

Bilurin fæst eisini við trinleysum CVT automatgearum, har eisini ber til at skifta manuelt. Eykaútgerðin umfatar t.d. Xenon forlyktir og DVD satellitt navigatiónsskipan. Standardútgerðin er til dømis 16" hjól, automatiskt klimaanlegg, fjarstýrt sentrallás, el-síðurútar, el-síðuspegl, fløguspælari við 6 hátalarum og borðtelda.Við nýggja Primera hava konstruktørarnir hjá Nissan gjørt alt fyri at sameina sportligar og komfortablar koyrieginleikar í einum elegantum bili.



*Primera innan. 3 rund instrumentir í miðjuni á instrumentborðinum. Konsollin í miðjuni er designað sum eitt telduknappaborð*

## Nissan Primera Acenta 1.8 sedan

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1.8 litur 4 syl. 16V 116 hk |
| 0-100 km/t | 11,9 sek |
| Bensinýtsla | 13,5 km/l |
| Dekkstødd | 205/60-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 456,7 cm |
| Breidd | 176,0 cm |
| Hædd | 148,2 cm |
| Eginvekt | 1275 kg |
| Viðførisrúm | 450 litrar |
| Prísur | Kr. 235.000,- |

Søluumboð
P/F Meinhardt Arge
við Oyggjarvegin
FO-110 Tórshavn
Tel. 316161
www.nissan.fo